# H SUM HÚSINI



## Fylgja við

Familjan hjá Helga í Íslandi hava víst byggingini á Eiði stóran áhuga. Tey hava alla tíðina ynskt at vita, hvussu gekk við drúgvu tilgongdini sum skuldi enda við einum snotiligum sethúsum yviri í Gjógv.

Ein máti at gera hetta er við at brúka møguleikarnar á alnótini.

– Vit hava tikið nógvar myndir og lagt tær út á Facebook, og soleiðis hava tey kunnað fegnast um framgongdina.

– Nú gleða tey seg bara at koma til okkum at ferðast møguliga komandi summar. So mugu vit bara gera alt fyri at húsini verða liðug tá, sigur Helfrid.